Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 17. feruar 2006



**Musikkprogrammið - Depeche Mode special**

25. februar spælir bólkurin Depeche Mode í Parkini í Keypmannahavn. Í 25 ár hava teir verið í gongd og eru millum teir heimsins størstu. Í samband við at bólkurin kemur til Keypmannahavnar hevur musikkprogrammið eina sending um bólkin á skránni, og eisini vitjar danski bólkurin Epo-555.

**Fríggjadag 17. kl. 22.00**



**Fótbóltur: Real Madrid - Arsenal**

So eru fjórðingsfinalurnar í Champions League, sum øll fótbóltsáhuga so leingi hava bíðað eftir, endiliga á skránni. Í kvøld bresta Real Madrid og Arsenal fyrst saman á Bernabeu leikvøllinum og síðan verður sent frá dystinum millum Bayern Munchen og AC Milan.

**Týsdag 21. kl. 18.30**

**Ekkó - Tá holdið gerst bert.**

Eru vit vorðin fríari enn fyrr, tá talan er um erotikk og sex? Hesum spurninginum roynir Ekkó-sendingin hesaferð at svara. Fyri ikki so nógvum árum síðani vórðu hvassorðað lesarabrøv skrivað í bløðunum ímóti príslistanum hjá Daells Varehus, tí har vóru myndir av kvinnum í berum undirklæðum. Tann tíðin er helst farin. Í dag verður skipað fyri homeparties við sexleikum, og undirklæðir í tí frekara endanum kunnu væl keypast í føroyskum handlum. Til ber eisini at keypa myndabløð og lesitilfar um erotikk og sex. Men eru føroyingar so eisini vorðnir minni blúnir hesi seinastu árini?

**Sunnudag 19. kl. 20.00**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**